# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Suzuki Intruder cruisarar

**Intruder eru nakrar av flottastu cruisarunum hjá Suzuki. Tær verða gjørdar í trimum ymiskum 1800 útgávum: C 1800 R, M 1800 R2 og M 1800 R/Z**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Suziki er Intruder C 1800 R*





Japanska Suzuki verksmiðjan er ein av heimsins størstu motorsúkkluverksmiðjum við einum stórum programmi við nógvum ymiskum motorsúkklum. Ein av nýggjheitum frá Suziki er Intruder C 1800 R, sum er ein tekniskt framkomin motorsúkkla við trygdini í hásæti. C 1800 R útgávan er ein flott súkkla við klassiskum designi, meðan Intruder M 1800 R2 og Intruder M 1800 R/Z faktiskt eru somu súkklur og so gott sum óbroyttar frá í fjør.

Motorarnir eru teir somu á øllum útgávunum: 1,8 litra vatnkøldir V2 (4-takt) motorar við 114 hk (C 1800 R) og 125 hk (M 1800 R2 og M 1800 R/Z).

Súkklurnar taka seg væl út og eru góðar at sita á og at koyra. Tær eru kvikar og koyriegineikarnir eru heilt í topp, eisini við ferð í svingum. Instrumentini eru løtt at avlesa undir koyring.

M 1800 R2 og M 1800 R/Z eru næstan eins men við ymsikum frávikum sum t.d. er munur á forlyktunum. Nógv er gjørt burturúr designinum, sum er í nýggjasta og mest nútímans stíli.

Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn, sum umboðar Suzuki motorsúkklurnar.

Fyritøkanumboðarmotorsúkklumerkini Kawasaki og Ducati. Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leikjum til aðrar MC-síður. Suziki er Intruder kosta úr kr. 134,677.



*Suzuki Intruder M 1800 R/Z*



*Suzuki Intruder M 1800 R2*

# Mercedes ávarar troyttar bilførarar

**Mercedes-Benz hava gjørt eina nýggja assistentskipan fyri bilførarar, sum verða troyttir og hava hug at sovna undir koyring**

BILAR



Ein skipan hjá Mercedes-Benz, sum ávarar troyttar bilførarar undir koyring, verður í hesum døgum roydarkoyrd, áðrenn hon verður klár at framleiða, verður upplýst frá Mercedes í Týsklandi.

Skipanin ávarar bilføraran gjøgnum sensorar, sum registrera tá bilførarin broytir koyristíl og fer at koyra annarleiðis. Tað er tað sum hendir, tá førarin verður troyttur og reagerar annarleiðis enn vanligt. Førarin fær eina ávaring frá skipanini, sum leggur upp til ein støðg í koyringini.

Mercedes vænta at nýggja assistentskipanin verður tikin í nýtslu einaferð næsta ár.

**mg**